# ítróttur

Nr. 29 mikudagur • 12. februar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo


# Strandingar skulu reisa seg aftur

**Kravið hjá Neistanum og VÍF er full úrtøka, um tey framhaldandi skulu vera oddalið**

UPPTAKT

*Páll Holm Johannesen*



*Vestmenningar hava havt eitt misjavnt endaspæl, og um teir framhaldandi skulu vera oddalið, er kravið ein sigur á kollfirðingum í kvøld.*

*Mynd: Savnsmynd*

Eftir ósigurin í steypafinaluni ímóti Kyndli leygardagin, skulu strandingar reisa seg aftur. Teir fáa í kvøld vitjan av H71, sum rættiliga hevur bitið frá sær í endaspælinum. Í løtuni liggur STÍF á triðja plássi í landskappingini, eitt stig eftir oddaliðini Neistan og VÍF. Skal sambandið við oddin varðveitast, skulu strandingar vinna dystin ímóti H71 í kvøld.

Fyri H71 ræður um at halda fast um góða spælið, liðið hevur víst seinastu vikurnar. H71 liggur í løtuni fýra stig eftir oddaliðini, og vinna hoyvíkingar á Skála í kvøld, so hevur H71 bráddliga samband við oddin í føroysku landskappingini.

### Neistan skal vinna

Neistin fær í kvøld vitjan av Tjaldrinum í høllini á Hálsi. Skal Neistin framhaldandi vera við í kappingini um gullkrónurnar í landskappingini í ár, so er kravið ein sigur ímóti botnliðnum úr Runavík

Neistin hevur havt eitt misjavnt endaspæl. Teir taptu heldur óvæntað ímóti H71, meðan teir vunnu tepran sigur á KÍF. Neistin er favorittur undan dystinum, og hava stórskjúttarnir, Áki Mørk og Morgan Knezevic, ein góðan dag, burdu Neistamenn fingið fulla úrtøku úr dystinum í kvøld.

Tjaldursmenn hava bert leikt ein dyst í endaspælinum. Teir taptu ímóti KÍF, og tískil fingu runavíkingar ikki bestu byrjanina á endaspælið. Tjaldur hevur í løtuni trý stig, og skal tað eydnast teimum at fáa samband við hini liðini, so skal keðiliga gongdin vendast.

Seinast Tjaldur vitjaði Neistin var um reppi, at teir fóru avstað við øllum stigunum. Skal tað eydnast Tjaldrinum at fáa stig í kvøld, so er nógv treytað av, hvussu toppskjúttin í landskappingini, Dragisa Stojovic, fer at standa seg.

### Grannauppger í Vestmanna

Eins og hitt oddaliðið, Neistin, hevur gingið misjavnt hjá VÍF í endaspælinum. Teir vunnu á Kyndli, men máttu óvæntað lúta fyri hoyvíkingum næst seinasta leygardag.

VÍF hevur verið nógv darvað av skaðum í endaspælinum, so breiddin á liðnum hevur rættiliga sloppið at staðið sína roynd. Undan dystinum í kvøld er VÍF favorittur, og fyri at framhaldandi at kunna kalla seg oddalið, er kravið ein sigur á kollfirðingum í kvøld.

KÍF liggur í løtuni í miðjuni í 1.deild, og skal liðið fáa samband við fremstu liðini, so skulu kollfirðingar vinna dystin í kvøld. Hóast tað kann tykjast ein trupul uppgáva, so hevur KÍF víst í ár, at liðið kann arga oddaliðini. Eins og í hinum dystunum, mugu kollfirðingar lýta á jugoslavarnar, Damir Oros og Mirko Milenkvic, gera ein vørr í kvøld.

# Jákup væl nøgdur við umstøðurnar

ROYNDARVENJING

*Páll Holm Johannesen*

Mánadagin vandi Jákup á Borg fyri fyrstu ferð við Superliga liðnum OB. Venjingin var á graslíkið, tí grasvallirnir í Danmark eru ikki í nóg góðum standi.

Í viðmerking til almennu heimasíðuna hjá OB, sigur Jákup á Borg seg vera sera væl nøgdan við umstøðurnar í OB. Hann leggur afturat, at móttøkan av honum hevur einastandandi, og at hann vónar at spæla seg til ein sáttmála í felagnum.

- Eg vóni, eg fari at standa meg væl komandi dagarnar, og so fáa vit at siggja, hvat spyrt burturúr, sigur Jákup á Borg í stuttari viðmerking á heimasíðuni hjá OB

Ætlanin er, at Jákup skal venja við OB til hósdagin. Fríggjadagin gongur leiðin til Spania við landsliðnum. Eftir venjingarleguna í Malaga, skuldi verðið greitt, um enn ein føroyingur verður at síggja fremstu donsku fótbóltsdeildini.





*Jákup á Borg , sum her sæst venja í OB, sigur seg vera væl nøgdan við umstøðurnar í OB*

*Mynd: www.ob.dk*

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 434 | 356 | 78 | 11 |
| 2 | Neistin | 2 | 1 - 0 - 1 | 395 | 365 | 30 | 11 |
| 3 | StÍF | 1 | 0 - 1 - 0 | 375 | 323 | 52 | 10 |
| 4 | Kyndil | 2 | 0 - 1 - 1 | 368 | 373 | -5 | 7 |
| 5 | KÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 360 | 383 | -23 | 7 |
| 6 | H71 | 2 | 2 - 0 - 0 | 360 | 408 | -48 | 7 |
| 7 | Tjaldur | 1 | 0 - 0 - 1 | 321 | 405 | -84 | 3 |

### Dómaráseting

**Mikudagur 12/2**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Neistin-Tjaldur | I menn | 20.00 | Hálsi | Hannis/Eyðun |
| StÍF-H71 | I menn | 20.00 | Skála | Kári/Trúgvi |
| VÍF-KÍF | I menn | 20.00 | Ve | Kristian/Sámal |



# Altjóða dómari í steypafinalunum 15. februar

TÍÐINDASKRIV

Flogbóltssambandið hevur fingið avtalu við kenda altjóða dómaran Birger Christensen, um at koma til Føroya at døma steypafinalurnar leygardagin í Høllini á Nabb.

Birger Christensen er bert 32 ára gamal, men hevur havt eina flúgvandi byrjan sum flogbóltsdómari. Hann fekk útbúgving sum divisiónsdómari í 1993, har John Lilhauge var leiðari fyri skeiðnum, og tað var júst John sum fyri tveimum árum síðani var í Føroyum og dømdi flogbóltsfinalurnar í 2001.

Birger Christensen er longu nú ein royndur harri, sum hevur dømt fleiri altjóða dystir. Hann byrjaði at døma í bestu donsku deildini í 1996, og fekk sítt altjóða dómaraprógv í 2000, og hevur hann higartil dømt umleið 35 altjóða dystir, umframt 550 dystir í donsku kappingini.

Og í ár var hann eisini 1. dómari, tá danir leiktu sína steypafinalu, og sum eisini hevði føroyska luttøka og vinnara, við tað at Bárður B. Mikkelsen leikti við Holte í hesari finaluni.

Íalt hevur Birger Christensen dømt 4 steypafinalur higartil - harav tríggjar sum 1. dómari, umframt at hann hevur dømt 4 DM finalur - harav 2 sum 1. dómari.

### Døma saman við føroyingum

Í kvinnudystinum millum ÍF og TB verður tað Tummas Óli Mortensen, sum kemur at virka sum 2.-dómari. Tummas Óli hevur dømt í fleiri ár, og var hann eisini 2. dómari í mansfinaluni í 2001.

Í mansdystinum millum ÍF og SÍ, verður tað Jan Hentze, sum skal finna floytuna fram. Jan Hentze hevur eisini dømt í fleiri ár, og hevur drúgvar royndir á økinum.

Tað verður spennandi at síggja, um tað verður stór broyting í dømingini, orsakað av, at dómarin hevur altjóða viðurkenning í mun til hvat teir bestu dómararnir her heima hava dømt, tí dómaraøkið er eitt evni, sum Flogbóltssambandið er farið at taka upp, og sum júst Jan Hentze er settur sum leiðari av.

### Jan Hentze - Spentur uppá dømingina

- Tað verður spennandi at royna seg saman við einum altjóða dómara, sum hevur verið víða um og dømt altjóða dystir. Tað er jú altíð læruríkt at døma saman við einum, sum hevur royndir á økinum, og uttan iva fer ein at læra okkurt av hesum, sigur Jan Hentze.

- Eisini verður tað spennandi at síggja, hvussu føroysku leikararnir fara at uppføra seg yvirfyri einum 1. dómara, sum teir ikki kenna frammanundan, og hetta fer uttan iva at seta sín serliga dám á finalurnar.

# Leikari úr Paraguei roynir seg í HB

**Enn er ov stutt fráliðið, til at siga nakað um dygdirnar hjá Hugo Velazqvez**

FÓTBÓLTUR

*Páll Holm Johannesen*

Síðan 1.lið hjá HB fór undir venjingina seinasta mánadag, hevur ein leikari úr Paraguei vant við.

Talan er um 20 ára gamla, Hugo Cesar Velazqvez, sum hevur valt at royna eydnuna í HB. Ætlanin er, at leikarin úr Paraguei, skal venja við 1.liðnum komandi vikurnar, og síðani verður støða tikin, um hann skal knýtast at felagnum.

HB-venjarin, Frank Skytte, sigur, at tað er torført at siga nakað um dygdirnar hjá Hugo Velazqvez, tí so stutt er fráliðið.

– Tað hevur verið nógvur kavi, og eisini skal ein taka hædd fyri, at hann júst er komin til landið. Hann skal venja seg við graslíkið, og tí fara komandi vikurnar at vísa, um hann er ein leikari, vit kunnu nýta, sigur Frank Skytte um Hugo Velazqvez

Hugo Cesar Velazqvez er áleypari, men kann eisini nýtast frammalaga á miðvøllinum.

# Innflutt gólv til finalurnar og stórskíggi

TÍÐINDASKRIV

Flogbóltssambandi hevur í sambandi við steypafinalurnar leygardagin 15. februar leigað eitt serligt flogbóltsgólv til landið, sum bert verður nýtt henda eina dagin í høllini á Nabb. Hesi gólvini verða eisini nevnd Taraflex-gólv, og verða nýtt í øllum stórum altjóða kappingum.

Í finaludystunum verður sjálvur vøllurin orangelittur, og alt umráðið runt vøllin verður grønt. Á henda hátt slepst undan øllum óneyðugum strikum og linjum v.m., sum eru til ampa fyri leikarar, dómarar og áskoðarar.

Eitt slíkt gólv er dýrt at keypa, og tá fyrstu finalurnar vóru leiktar fyri 3 árum síðani, var tað eitt av tíðindafólkunum sum spurdi, nær ætlanina var at leika á tílíkum gólvi. Flogbóltssambandi hevur kannað kostnaðin av tílíkum gólvi, og liggur hesin kostnaður um kr. 180.000 fyri eitt nýtt gólv.

Í ár er tað so við vælvild frá Dansk Volleyball Forbund, at gólvið er í Føroyum, tí leigusáttmáli er skrivaður til bert hesar báðar dystirnar. Í sambandi við at gólvið verður lagt á í høllini fríggjakvøldið, kemur ein dani at hjálpa til við hesum, soleiðis at alt verður gjørt á rættan hátt, nú hetta verður roynt á fyrsta sinni í Føroyum.

Bert teir leikarar sum hava verið á føroyska landsliðnum hava roynt tílík gólv áður.

- Vit eru sera spentir uppá, hvussu gólvið fer at roynast, tí hetta skuldi givið ein serligan stemning í høllini henda dagin. Roknast kann við, at ljósið verður betri í høllini, umframt at hetta fer at taka seg sera væl út í sjónvarpinum, sum saman við útvarpinum, fer at senda beinleiðis frá steypafinalunum, sigur Niclas Joensen, formaður í Flogbótlssambandi Føroya.

- Eisini rokna vit við, at lýsingarnar runt vøllin koma nógv betri til sín rætt, og sostatt koma at síggjast betri, sigur Niclas at enda.



### Stórskíggi aftur í ár

Aftur í ár verður uppsettur ein stjórskermur í høllini, sum verður umleið 5 * 6 metur. Á stórskerminum verður víst alt tað sum sjónvarpið sendir beinleiðis, og á henda hátt verður gjørligt at síggja allar teir avgerandi bóltarnar í slowmotion ella replay í høllini - ella um bólturin var úti ella inni !!.

- Hetta gav ein serligan dám í høllini seinasta ár, og tí hava vit valt at endurtaka tiltakið í ár, sigur Magnus Tausen, frá Flogbóltssambandinum.

- Seinasta ár var tað nakað ljóst í høllini har stórskermurin var, men hetta ætla vit at bøta um í ár, soleiðis at hyggjaraviðurskiftini vera betri, sigur Magnus.

### Landsstýrismaður og borgarstjóri handa

Tað verður borgarstjórin í Havn, sum fer at handa steypið til kvinnunar, meðan tað verður landsstýrismaðurin í Undirvísingar- og Mentamálum Annlis Bjarkhamar, sum kemur at handa steypið til menninar.

Steypið er givið av høvuðsstuðlinum hjá Flogbóltssambandinum Føroya Sparikassa, sum eisini kemur at handa heiðursmerkini.

# Nýggir leikarar í AB

FÓTBÓLTUR

*Páll Holm Johannesen*

Tað hava verið nógvar leysasøgur, um leikarar, ið hava verið settir í samband AB. Argjamenn fóru undir venjingina í seinastu viku, og higartil hava tveir nýggir leikarar verið og vant við.

Talan er um Karl Leonsson og Una Mortensen, sum ávikavist hava umboðað B36 og HB. Báðir hava spælt einstakar dystir á besta liðnum, men hava fyri tað mesta leikt á øðrum liði hjá feløgunum.

Úr AB verður sagt, at báðir leikarar ætla sær at spæla við AB í ár. Karl Leonsson, Uni Mortensen saman við Eyðun Samuelsen eru ein kærkomin styrkur hjá argjamonnum í 2.deild í ár.